# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Føðingaradagsheilsan til

## Elsu Mariu Højgaard

### Saltangará



Í dag 7. juli fyllir Elsa Maria Højgaard, vanliga nevnd Essemi 80 ár.

Essemi er dóttir Josefinu og Sigmund Olsen á Toftum.

Essemi er nummar trý av átta syskjum.

Tá í tíðini lá nógv húsligt arbeiði á ungum gentum, og hennara partur lá ikki eftir. Hon hevði brøður sum vóru sjómenn, og tá lá tað ikki bara á mammuni, men eisini á systrunum at gera teir skipsbúnar.

Essemi bleiv gift í 1946 við Peturi Højgaard í Saltangará, vanliga nevndur Petur hjá Palla.

Tey fingu 10 børn harav 9 eru á lívi, 6 gentur og 3 dreingir.

Sólbjørg, Poula og Halla búgva í Danmark, Erla býr í Leirvík, Danjal Petur í Havn, Guðny í Gøtu og Jónhild, Sigmund og Brandur búgva í Saltangará.

Ommubørnini eru 14 í tali og langommubørnini eru 5 í tali.

Essemisa lutur hevur altíð ligið í heiminum, tað var ikki bara maður og børn, men so sanniliga eisini kúgv og høsn.

Tá øll børnini vóru komin uppundan, fekk hon sær lønandi arbeiði á Vistarheiminum í Runavík.

Er tað nakað, ið sermerkir Essemi, so er tað sansurin fyri at halda alt reint og ruddiligt í heiminum og annars rundan um seg. Og nú aldurin er høgur, er tað enn nakað, ið hon gongur høgt uppí.

Tað er altíð stuttligt og hugnaligt at koma inn til Essemiu. Blíðskapurin kennir ongi mørk og fyri ikki at tala um kærleikan og hjartalagið hon hevur fyri børninum, ommu- og langommubørninum. Hon borðreiðir bæði fyri stórum og smáum og øll eru mett og glað. Hannara gávumildni kennir heldur ongi mørk. Hon gevur tað hon kann geva. Onki ommu- ella langommubarn fer tómhent út frá henni. Altíð eitt oyra í lumman.

Føðingaradagin verður Essemi burturstødd, men vit vilja ynskja Essemiu hjartaliga tillukku við tí stóra degnum og góðan byr og Guds ríku signing framyvir.

**Tíni kæru.**




### Dagurin 7. juli

**Villebaldus,** deyður í 787. Saman við pápa sínum Rikardi og bróðurinum Vunibaldus gjørdi hesin enski munkurin pílagrímsferð til Róm og var tann einasti, ið kom fram. Seinni gjørdist hann biskupur í Eichstadt í Bayern.

# Maria Poulsen í nýggjum hami



*Ein nýggjur baðirúmshandil er latin upp, har arbeiðast skal fram ímóti at fáa handilin at gera tann leiðandi innan baðirúm í Føroyum*

**Havn:** Týsmorgunin lat Maria Poulsen upp nýggja baðirúmshandil sín á Hálsi.

Umframt allar vanligar vørur, ið hoyra heima í slíkum handli, so er hetta samstundis størsta framsýningin her á landi av baðirúmsmøblum.

Framsýningin í handlinum hevur m.a. til endamáls at vísa á, at baðirúmið ikki longur bara er eitt funktionelt rúm, men eisini eitt rúm har dygd og lívsgleði koma til sjóndar.

## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálptu til, tá okkara høgt elskaði sonur, maki og pápi

**Damgar Petersen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðaður.

Stóra tøkk fyri peningagávur, kransar og blómur og tøkk til øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Gud vælsigni tykkum øll.

*Familjunnar vegna*
**Ingibjørg, Kirsten, Ingigerð og Ragnar**

## Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri bróðir okkara og vinur

**Tróndur R. E. Dam**
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 4. juli 76 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni fríggjadagin 8. juli kl. 14.

*Familjunnar vegna*
**Frank, Una, Eivind og Morensa**